Stjórnin sinnað at lækka blokkin

Men vit tryggja sær, at útrokningarnar hjá landsstýrinum eru í lagi. Lógaruppskot hesum viðvíkjandi verður lagt fram í heyst

SJÁLVSTÝRISMÁLIÐ
Eirikur Lindenskov

– Eg havi biðið kensluméláraðharran og almannamálaráðharran um at seta seg í samband við landsstýrið fyri at leggja til rættis samráðingarnar um yvirtøku av málsøkjum eftir grein 2 í Heimastýrislógini.

Hetta sigur Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri í brævi til løgmann, sum er svar upp á seinasta útspælið frá landsstýrinum í sjálvstýrsmálinum.

Í brævingum til forsætismálaráðharran, sum var dagfest 31. mai 2001, kunnaði løgmaður um yvirtøku av skúlaverkinum og almannaforsorgini sum føroyskt sermál.

Upp á spurningin um at taka yvir ávís málsøki sigur forsætisráðharrin, at stjórnin í samsvar við grein 2 í Heimastýrislógini sjálvandi viðurkennir rættin hjá heimastýrinum at taka yvir tey málsøki, sum er nevnd á lista A.

– Stjórnin er somuleiðis sinnað at ganga ynskinum hjá landsstýrinum á møti um, at blokkstuðulin fyri 2002 verður minkaður.

Vil tryggja sær at alt er í lagi

Í brævinum til løgmann leggur forsætisráðharrin dent á, at stjórnin er av teirri sannføring, at yvirtøkur av málsøkjum krevja eina skilagóða avkláring av lógarligum og fyrisitingarligum spurningum. Hann sigur eisini, at í praksis hevur Føroya Landsstýrið dagligu umsitingina av ávísum økjum, og nevnir hann í hesum sambandi skúlaøkið.

– Samráðingar um hesar spurningar skulu fyri tey øki, tú nevnir í brævinum, vera við ávikavist kensluméláraðharran og almannamálaráðharran, sigur forsætismálaráðharrin, sum tí hevur biðið hesar báðar ráðharranar taka sær av málunum.

Viðvíkjandi málinum at lækka blokkstuðulin næsta ár sigur forsætisráðharrin:

– Við respekt fyri ynskinum hjá meiralutanum í løgtinginum og umbønini frá landsstýrinum, er stjórnin sum útgangspunkt sinnað at ganga ynski landsstýrissins á møti um at lækka blokkstuðulin 356 milliónir í 2002.

Hetta er tó treytað av, at ein nærri gjøgnumgongd og avmarking av hesum báðum málsøkjum staðfestir, at búskaparliga uppgerðin hjá landsastýrinum er rætt, sigur forsætisráðharrin eisini íbrævinum.

Anfinn Kallsberg fekk umsíðir svarið frá Poul Nyrup Rasmussen. Hann sleppir at taka yvir skúla- og almannaøkið og at lækka blokkin 356 milliónir krónur – um allar útrokningarnar annars eru í lagi

Fyrst samráðast um yvirtøkurnar

Poul Nyrup Rasmussen sigur víðari, at restin av blokkstuðlinum verður veittur – eftir somu prinsippum sum í dag – til útreiðslunar hjá heimastýrinum á teimum málsøkjum, sum frá 1. januar 2002 framvegis eru umfatað av grein 9 í Heimastýrislógini.

– Eg haldi tað tí vera rættast, at ein endalig avtala um blokkstuðulin fyri 2002 báðar til eftir at samráðingarrarbeiðið er fingið frá hondini, sigur Poul Nyrup Rasmussen, sum leggur afturat, at stjórnin í heyst fer at seta fram uppskot um lóg um blokkstuðulin fyri 2002.

At enda sigur forsætisráðharrin í brævinum til Anfinn Kallsberg, løgmann, at ætlanin hjá stjórnini er at greiða búskaparligu og fyrisitingarligu spurningarnar so tíðliga, at neyðugu lógartiltøkini frá stjórnarinnar síðu kunnu føra til, at tað verður gjørligt at fremja ætlan landsstýrissins 1. januar 2002.

Tilvildarlig og støðuleys málsviðgerð

Okkurt óregluligt fór fram á kommunuvalinum á Eiði seinasta heyst. Hetta varð greitt, tá fínteljingin vísti, at ein atkvøðuseðil var meira í atkvøðukassanum, enn talið á veljarum, sum vóru skrásettir at hava verið á vali. 3. partur:

KOMMUNUVAL
Jóanes N. Dalsgaard

Tá tað varð greitt, at bygdarráðið á Eiði ikki sjálvt fór at gera nakað við málið, kærdi ein borgari málið til landsstýrið. Í kæruni kravdi borgarin, at greiða varð fingin á hvat var hent.

Landsstýrið burturvísti seinni kæruni. Landsstýrið helt, at einki var sum bendi á, at óreglusemið hevði havt nakra ávirkan á valúrslitið. Og við hesi grundgeving vildi landsstýrið ikki gera meira við málið.

Umval í Oyndarfirði

Eftir kommunuvalið í 1996 avgjørdi landsstýrið at nýval skuldi vera í Oyndarfirði. Hendan avgerð fall eftir at tað var staðfest, at óreglusemi hevði verið í sambandi við valið.

Í grundgevingini frá landsstýrinum stóð, at umval skuldi vera, hóast einki var sum bendi á, at óreglusemið hevði havt nakra ávirkan á valúrslitið.

Hvørjum líkist tað...?

Spurningurin er so, hvussu landsstýrið kann koma til tvær so fullkomiliga ymiskar niðurstøður, á nærum sama grundarlag. Ein møguleiki er sjálvandi, at grundarlagið undir báðum avgerðunum, hóast líkt, kortini er ólíkt á avgerandi hátt. Latið okkum kannað eftir, um so er.

Óreglusemi í Oyndarfirði...

Málið um kommunuvalið í Oyndarfirði 1996 snúði seg um, at fýra fólk høvdu verið inni í valhølinum og greitt atkvøðu uttan, at valnevndin hevði verið til staðar. Hetta var hent í døgurðasteðginum, meðan valnevndin var við hús og fekk sær. Valhølið hevði staðið opið, hóast valnevndin var burturstødd. Teir fýra veljararnir høvdu í góðari trúgv greitt atkvøðu, og sæst hetta m.a. av at teir høvdu lagt boð eftir seg til valnevndina. Tá upptalt var, var einki sum bendi á, at teir fýra veljararnir høvdu gjørt annað enn at greiða eina atkvøðu í part.

Landsstýrið staðfesti í sambandi við viðgerðina av kærumálinum, at valnevndin hevði borið seg skeivt at. Kommunuvallógin ásetir, at valhølið skal vera stongt, so at einki fólk sleppur inn tá valnevndin ikki er til staðar. At valhølið hevði verið opið, uttan at valnevndin var til staðar var sostatt brot á kommunuvallógina.

Samstundis ásannaði landsstýrið, at »feilirnir« í sambandi við valið neyvan høvdu havt ávirkan á valúrslitið. Tað var við øðrum orðum einki sum bendi á, at nakar við vilja hevði roynt at ørkymla valúrslitið. Tað, at teir fýra veljararnir høvdu lagt boð eftir seg, var í sær sjálvum tikin sum ein greið ábending um, at teir einki óheiðurligt høvdu havt í kvittanum.

Hóast hetta, so legði landsstýrið dent á, at »formligu feilirnir við valinum [eru] so álvarsligir, at valið eigur at fara fram av nýggjum.« Niðurstøðan hjá landsstýrinum í sambandi við valóreglusemið í Oyndarfirði 1996 var við øðrum orðum, at hóast eingin illgruni var um, at valúrslitið var ávirka tað minsta vet orsaka av »feilunum« við valinum, so skuldi umval haldast.

...og óreglusemi á Eiði

Í Eiðismálinum er støðan at kalla beint tann øvugta. Málið snúði seg sum nevnt um, at ein atkvøðuseðil var komin í atkvøðukassan uttan, at nakar dugdi at siga, hvaðani hann var komin.

Í sambandi við valið verða vallistar førdir, m.a. fyri at tryggja, at eingin kann greiða atkvøðu meira enn einaferð. Øll, sum fáa ein atkvøðuseðil útflýggjaðan, skulu sambært kommunuvallógini skrásetast á tveimum listum, sum tveir valnevndarlimir skulu føra hvør sær. Tá valið er liðugt, skal talið á vallistunum báðum samsvara, eins og talið á vallistunum og talið á atkvøðuseðlum skal samsvara.

Hetta seinasta var ikki uppfylt tá fínteljingin av Eiðisvalinum var liðug. Ein atkvøða var meira í atkvøðukassanum enn talið var veljarum, sum skrásett var á báðum vallistunum.

Eingin kann siga, hvat er hent, men møguleikarnir eru bara tveir. Antin hava tveir valnevndarlimir í senn gloymt at skriva tann sama veljaran upp á hvør sín vallista. Ella hevur onkur sníkt eina atkvøðu í atkvøðukassan uttan, at valnevndin hevur varnast tað. Í báðum førum er talan um lógarbrot, í tí seinna førinum um álvarsligt revsilógarbrot.

Hóast illgrunan um, at onkur hevur roynt at benda valúrslitið, so er niðurstøðan hjá landsstýrinum, at valið skal standa við makt. »[A]t ein atkvøða er meiri við fínteljingina í mun til tað, sum vallistin vísir... er [ikki] orsøk nokk til, at spurnartekin... kann verða sett við... uppgerðina av valinum.«

Á Eiði er støðan øðrvísi...

Borgarin, sum reisti Eiðismálið vísir sjálvur til Oyndarfjarðarmálið í samskifti sínum við landsstýrið. Men landsstýrið vísir aftur, at málini kunnu samanberast: »[Í] Oyndarfirði var talan um, at ein grundleggjandi partur av eftirlitinum við sjálvari atkvøðugreiðsluni sveik. Á Eiði er støðan øðrvísi...«.

Karl Johansen: Eg veit ikki hví Ingeborg er óð

– Tað hevði verið heilt sinnisjúkt av okkum at stuðla Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag í verkfallinum, sigur Karl Johansen

FAKFELAGSSTRÍÐ
Áki Bertholdsen

– Eg veit hví Ingeborg Vinther er so óð.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, skilir ikki, hví Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag eru so óð um, at Havnar arbeiðsmannafelag og arbeiðarafeløgini í Klaksvík nú hava fingið somu sømdir við aldursviðbót til arbeiðsfólkið, sum tey sjálvi hava fingið.

Eftir, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag høvdu verið í verkfalli, endaði tað við, at tey fingu aldurviðbót omaná vanligu tímalønina. Síðani er tað hent, at arbeiðsgevararnir av sínum eintingum hava givið Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík somu aldursviðbøtur.



– At Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki vilja samráðast saman við okkum er hevd fyri, at vit ikki vildu fara í samhugafverkfall við Starvsmannafelagið fyri nøkrum árum síðani, sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag

Í brævi til arbeiðsmenninir í Havn, feløgini í Klaksvík og Føroya Arbeiðsgevarafelag, hava Føroya Arbeiðarafelag hvassliga funnist at hesum og átalað, at hini feløgini fáa tær sømdir, ókeypis, sum tey hava verið í verkfalli fyri og tey spyrja eisini, hvar fakfelagsliga medvitið er.

Hevur skyldina sjálv

Men handan skolan rørir ikki formannin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Karl Johansen sigur, at Ingeborg Vinther hevur sjálv størstu skyldina av, at arbeiðafeløgini ganga í sjálvdrátti. Tí skilir hann ikki, hvat hon er óð um.

– Tað var hon, sum ikki vildu samráðast saman við okkum. Tað vóru ikki vit, sum ikki vildu samráðast saman við henni, tvørturímóti, sigur Karl Johansen. Hetta gjørdi hon fyri at hevna, at vit ikki fyri nøkrum árum síðani vildu fara í 24 samhugaverkfall við Starvsmannafelagið.

– At vit ikki vildu taka undir við tí, er í veruleikanum tað, sum framvegis elvir til ósemjuna, tí sum hevnd noktaði Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag at samráðast saman við okkum.

– Síðani hava vit samráðst hvør sær. Og tað endaði so við, at Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, valdu at gera sáttmála, heldur enn at fara í verkfall og tað er ikki annað, enn hon kann vænta, kann henda, táið feløgini samráðast hvør sær.

Orsøkin til verkfallið varð hinvegin, at í seinastu samráðing í 1999, fingu Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag 75 oyru meir um tíman fyri skiftisvakt.

–Tað var fyri at tvíhalda um, at at tey skuldu hava hesi 75 oyruni meir, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, fóru í verkfall. Tey fóru í verkfall uppá, at tey skuldu fáa meiri í løn enn vit.

– Hon vildi ikki sleppa hesum lønarmuni upp á 75 oyru. Hetta er ikki tað, sum eg kalli fakfelagsligt medvit, sigur Karl Johansen.

– Tað vildi verið heilt sinnissjúkt av okkum, at vit skuldu farið í samhugaverkfall og skriva yvirlýsingar fyri at stuðla einum verkfalli, sum hevði til endamáls at tryggja, at arbeiðsmenn í Havn og verkfafólk í Klaksvík skuldu fáa minni í løn, enn arbeiðsfólk aðrastaðni í landinum, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Karl Johansen skammast heldur ikki um, at, Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík síðani hava fingið somu sømdir.

– Hetta er ikki nakað, sum vit hava biðið. Hetta er nakað, sum arbeiðsgevararnir hava tikið stig til, tí teir kunnu ikki liva við, at lønin er ymisk.

Bygdarstevna í Hvalba hetta vikuskiftið

Vælumtókti dansibólkurin, Taxi, fer at spæla á stórum stevnudansi í Hvalba í kvøld

Hetta vikuskiftið verða ymisk tiltøk á skránni á Bygdarstevnuni, sum Royn skipar fyri

BYGDARSTEVNA
Áki Bertholdsen

Hetta vikuskiftið skipar Bóltfelagið Royn fyri bygdarstevnu í Hvalba.

Hetta er aðru ferð í ár, at ætlanin er at hava bygdarstevnu í Hvalba, men fyrru ferðina kom verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag ímillum so at stevnan mátti avlýsast.

Men hetta vikuskiftið verður so roynt av nýggjum við fótbóltsvøllin, og tá fara eisini gamlar geggjur (Old Girls) úr Vági og úr Hvalba at spæla hondbólt. Klokkan fýra verður ein forvitnislig kapping ímillum eldri spælarar úr TB, VB, ROYN og SUMBA. Og tá verður eisini kakutombola í Roynhøllini.

Klokkan 20 hevur brøðrasamkoman útimøti við Gamlaskúla. Og aftaná spælir Taxi til dans í Roynhøllini.

Sunnudagin verða eisini nøkur tiltøk á skránni. Klokkan 14 spæla smádreingir hjá Royn og Sumba dyst og klokkan trý verður fólkafundur á Skúlastykkinum, Har fer Steinbjørn B. Jacobsen at flyta fram rødu, Barnakór úr Hvalba fer at syngja, næmingar úr Miðnámsskúlanum í Vági fara at bera fram yrkingar og Brandur Enni av Tvøroyri, fer at syngja.

Klokkan trý letur eisini Tivoli upp í Roynhøllini og klokkan 16 verður skemtidystur ímillum fólk av flakavirkinum á Tvøroyri og flakavirkinum íHvalba.

Royn sigur, at allir ítróttardystir á stevnuni eru steypadystir. Stevnudagarnar verða eisini lutaseðlar seldir til frama fyri felagsarbeiðið hjá Royn.

Í dag byrjar stevnan klokkan tvey, við skrúðgongu av fótbóltsvøllinum, vestur á Skúlastykkið, har Johild Hansen, hvalbingar, búsitandi á Argjum, flytur fram rødu. Tá fer Tvøroyrar Hornorkestur eisini at spæla.

Klokkan trý verða fleiri tiltøk á skránni, Tá letur tivoli upp í Roynhøllini. Samstundis ber til at sleppa ein ríðitúr á Berghestum við ymsum á skránni, bæði til gamans og álvara.

Stevnan byrjaði longu í gjár, tá ið pisufundur skuldi vera á Skúlastykkinum, hetta er fyrstu ferð, at pisufundur er í Hvalba. Aftaná skuldi Taxi hava konsert í Roynhøllini.

Stevnan byrjaði longu í gjár, tá ið pisufundur skuldi vera á Skúlastykkinum, hetta er fyrstu ferð, at pisufundur er í Hvalba. Aftaná skuldi Taxi hava konsert í Roynhøllini.

Búgvið í Caravan

Hugnið tykkum í Skotlandi

Atlantic Airways Caravan í Nairn.
Vit hava tveir ekslusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar. Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.
Nossligu og vælútgjørdu vognarnir eru heilar 42 fermetrar og hava umframt allan vanligan útbúnað, alskyns hentleikar so sum: sjónvarp, video, stereoanlegg, mikroovn, føroyskar leikur, -bøkur og -videobond. Knýtt at økinum er spælipláss, svimjihylur (innandura), hitarúm, solarium, minigolf o.a.

Nairn:
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Morayfjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.

Dømi:
Frá hósdegi til hósdag.
Um 2 vaksin og 2 børn undir 12 ár ferðast saman.

Við í prísinum er flog- og tokferð, gisting og køliskápið er fult við mati tá ið tit koma. Galdandi frá 31.mai - 02. juli.

8.528,-*

Prísir fyri hvønn um:
6 ferðast saman: 2.627,-*
8 ferðast saman: 2.470,-*

*) Ferðaavgjald sum í løtuni er kr.474,- fyri vaksin og kr. 354,- fyri børn kemur afturat prísinum.

Vit hava tveir "Caravans", ein til 6 og ein til 8 persónar.

MB-Tours M3
Tel: 32 21 21 - Fax 32 21 22

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 - Fax 34 10 01

www.atlantic.fo